Terji Nielsen 01.11.2006 - 23:32

# Harley nr. 50 til Føroya!

**Tann fyrsta skrásetta Harley-motorsúkklan kom til Føroya 12. juni 1995. Tað var Ove Ritter, sum hevði hana við til Føroya sum flytigóðs.**



Onkur sigur, at ein donsk kvinna hevði eina Harley í Føroyum í sekstiarunum og at ein skal hava verið í Suðuroynni í gomlum døgum, men Ove hevur ikki fingið hetta váttað. Ove situr annars og roynir at skriva føroysku Harleysøguna. Nú 24. juli kom Harley Davidson nummar 50 á keiina í Havn. Motorsúkklusølan hevur gingið so væl, at bara í ár hevur Spf. HD.fo selt 20 nýggjar Harley-súkklur. Í dag er tað eisini ein sannroynd, at fleiri enn 10% av Harley-eigarunum í Føroyum eru kvinnur.

Føroyska Harleyfelagið er limur í HOG - Harley Owners Group - sum er heimsins størsta felag fyri motorsúkklueigarar. Felagið varð stovnað í 1983 og hevur fleiri enn eina miljón limir um allan heim. Frá hesum felagnum frættist eisini, at áhugin millum kvinnur er vaksandi fyri Harley Davidson-súkklum. Serliga hevur hetta verið galdandi í londum sum Svøríki.

Ein Harley er nakað serligt. Tú hevur eitt petti av heimssøgu millum beinini, tá tú koyrir eina Harley. Harley er ein lívsstílur. Harley umboðar ævintýrið, dreymin um ævigan ungdóm, frælsi, ótálmaða møguleikan til altíð at ríða móti sólsetrinum í fullkomnum frælsi, opni landsvegurin......

Kvinnurnar eru vorðnar ein stórur partur av hesum. Tær vóru við frá byrjan, men mest sum pynt á reklamumyndunum, men longu frá 1910 hava kvinnurnar luttikið í Harley-ævintýrinum. Fyrstu kvinnurnar koyrdu tvørturum USA longu í 1915. Í dag eru heimsgitnir kvinnuklubbar, t.d. "Woman in the Wind" og "Women on Wheels".

Á heimasíðuni www.hd.fo kanst tú lesa eina rúgvu um Harley Davidson. Í løtuni hevur Ove Ritter eisini nøkur einastandandi góð tilboð uppá Harley-súkklur, harav fleiri snið eru á goymslu (sí myndirnar á hesi síðuni)!